# KÍ og GÍ eru í kvinnufinalu

Eftir seinnu hálvfinalurnar í steypakappingini hjá kvinnum, sum vórðu spældar í gjárvkøldið, er tað greitt, at KÍ og GÍ skulu spæla finaluna KÍ hevði í fyrru hálvfinaluni á heimavølli vunnið sær eina rættiliga trygga leiðslu, og B36 kundi heldur einki gera við 4-0 sigurin hjá KÍ í fyrra dystinum. KÍ vann eisini seinnu hálvfinaluna - dysturin í Gundadali endaði við 3-2 til KÍ, sum vann 7-2 samanlagt. Í Gøtu var meira spenningur undan dystinum, tí fyrri dysturin millum AB og GÍ endaði við 4-3 sigri til AB. Einki mál kom í fyrra hálvleiki, men í seinna hálvleiki gjørdi GÍ bart og skoraði fýra mál, meðan AB einki mál fekk.



# Laudrup til Spania

Nógv bendir nú á, at Michael Laudrup verður venjari hjá spanska Recreativo. Síðani hann í fjør gavst sum venjari hjá Brøndby, hevur Michael Laudrup verið settur í samband við fleiri sponsk feløg. Nú verður váttað, at fyrrverandi stórspælarin hevur fingið eitt tilboð frá Recreativo. – Vit kunnu vátta, at Laudrup hevur fingið eitt seriøst tilboð frá felagnum. Tað umhugsar hann nú, og vit hava lovað at svara teimum innnan næstu 3-4 dagarnar, sigur umboðsmaðurin hjá Laudrup, Bayram Tutumlu.

## Langt frá finaluni

Sámal Erik Hentze er saman við Piotr Krakowski venjari hjá EB/Streymi. Hann er væl nøgdur við sigurin, men ávarar sínum monnum ímóti at halda, at finalusessurin er vunnin.

– Í fjør vunnu vit eisini fyrru hálvfinaluna, men komu so til Havnar og taptu. Tað eiga vit at læra av, so vit eru enn langt frá finaluni, sigur Sámal Erik Hentze.

Hann rósar sínum leikarum fyri góða viljan, teir vístu í seinna hálvleiki, sum eisini var fremsta orsøkin til sigurin.

– Vit hava eitt ov lágt botnstøði, og tað kemst av vantandi stríðsvilja, men í gjár lá hesin ikki eftir, staðfestir Sámal Erik Hentze, sum eisini heldur at sigurin var uppiborin.

## Ikki mist mótið

Hjá Skála kom tað dátt við, at tapa við tveimum málum á heimavølli. Venjarin John Petersen hevur tó ikki mist móti.

– Hetta var fyrri hálvleikur, og teir føra 2-0. Nú er seinni hálvleikur eftir, og vit ætla okkum framvegis í finaluna, sigur hann.

John Petersen heldur, dysturin ikki var nakað serliga góður.

– Sunnudagin spældu vit eisini móti EB/Streymi, har vit spældu fínan fótbólt og vóru nógv betri, men í dag var einki gott lið á vøllinum, sigur John Petersen, sum metir at effektiviteturin frammanfyri málið var avgerandi.

– Í seinna hálvleiki hava vit tríggjar stórar kjansir, men skora ongan. Teir hava eisini tríggjar kjansir og fáa tvey mál, vísir hann á.

Skála – EB/Streymur 0-2 (0-0):

# Skála móti streyminum

**EB/Streymur hevur sett kósina móti fyrstu steypafinaluna nakrantíð, tá teir á Skála vunnu við tveimum málum móti ongum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Egil á Bø er liðformaður hjá EB/Streymi. Við Sosialin í gjár segði hann, at EB/Streymur mátti arbeiða har, stríðast og fáa spæli at koyra. Hetta síðsta eydnaðist ongantíð, men í seinna hálvleiki arbeiddu teir væl og stríddust. Lønin fyri hetta var tvey mál, meðan teir einki fingu ímóti sær.

Skála átti annars stóran part av fyrra hálvleiki. Pauli G. Hansen og Pætur Dam Jacobsen settu seg á miðvøllin, og Óbi arbeiddi fyri fleiri í álopinum. Ágrýtin, sterkur og arbeiðssamur sum hann er, órógvaði hann ferð eftir ferð verjuna so mikið, at sendingarnar hjá hesum gjørdust skeivar ella teir máttu sparka bóltin út av vøllinum.

Einasti trupulleikin hjá Óbi er, at hann ikki rakar málið. Faktiskt var hetta ikki bara ein trupulleiki hjá honum, men hjá Skála sum heild í gjár. Fleiri góðar kjansir høvdu teir, men nærmasta royndin var eitt frálíkt langskot frá Pætur Dam Jacobsen, sum brast á tvørtræið. Tá restaðu smáir tíggju minuttir til steðgin, men fyrri hálvleikur endaði altso málleysur.

### Avgerandi deyðbóltar

Í seinna hálvleiki fullu tvey mál – bæði eftir deyðbóltstøður. Tað fyrra kom eftir hornaspark úr vinstru, sum endaði heilt úti í høgra borði hjá Hans Paula Samuelsen. Hann sendi ein góðan bólt til fremru stong. Hans Jørgensen vardi fyrstu royndini á málið, men ta seinnu fekk hann einki gjørt við, tá Ronnie Samuelsen beindi leysa bóltin í netið.



*Tað kom illa við hjá Skála, at Alexandur Johansen mátti skaddur av vøllinum eftir hálvan tíma*
*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Hetta málið kom bert fáar minuttir eftir steðgin, og miðskeiðis í seinna hálvleiki kom tað næsta. Tað var eftir frálíkt frísparksinnlegg úr vinstru frá John Hera Dam, sum Hanus Eliasen setti í netið við góðum stútara. Fuglfirðingurin, sum byrjaði annars á beinkinum, var sera eyðsýndur eftir at hann kom inn fyri Arnbjørn Hansen.

### Møguleiki fyri fleiri málum

Var hepni við teimum appilsinlittu, høvdu teir fingið eitt mál ella tvey. Einaferð komu teir tríggir móti einum, men kloddaðu bóltin út av vøllinum, og eina aðru ferð kom Óbi púra leysur móti René Tórgarð, men hann sendi bóltin væl uppum.

Hinvegin hevði EB/Streymur eisini onkran stóran kjansin aftrat málunum. Tann størsta átti Gert Åge Hansen, tá hann í yvirtíðini fekk bóltin inni í fimm-metrinum, men vánaliga skoti rakti málverjan.

Seinastu løtuna spældi Skála dystin við tíggju monnum, tá Teitur Joensen fekk sítt seinna gula kort. Tilsamans seks gul kort fullu í dystinum, sum var lutfalsliga harður, men ikki ljótur kortini.

Status eftir dystin er, at EB/Streymur hevur væl betri kort í hondini til seinna dystin enn Skála. Spurningurin er bara, hvussu hesi verða spæld. Hesum fæst svar fyri 11. juli, tá seinna hálvfinalan verður spæld.

## FAKTA

Skála – EB/Streymur 0-2 (0-0)
0-1: Ronnie Samuelsen, 52.
0-2: Hanus Eliasen, 74.
Dómari: Petur Reinert
Skála: Hans Jørgensen – Teitur R. Joensen, Rúni Rasmussen, Milic Curcic, Arnhold Berg – Bogi Gregersen (85.: Jógvan G. Joensen), Pætur Dam Jacobsen, Levi Hanssen (Tony Rasmussen, 88.), Pauli G. Hansen, Alexandur Johansen (Slavisa Kaplanovic, 32. – Obele Okeke Onyebuchi.
Gult kort: Teitur R. Joensen
Reytt kort: Teitur R. Joensen (tvey gul)
EB/Streymur: René Tórgarð – Gert Å. Hansen, Egil á Bø, Marni Djurhuus, Símun Eliasen – Rafal Kwiecienski, Bárður Olsen, Ronnie Samuelsen (Brian Olsen, 76.), John Heri Dam (Esmar Eiðisgarð, 89.) – Arnbjørn T. Hansen (Hanus Eliasen, 70.), Hans Pauli Samuelsen.
Gult kort: Arnbjørn T. Hansen, Ronnie Samuelsen, Brian Olsen, Símun Eliasen.

HB-VB/Sumba 3-1 (0-1)
0-1: Birgir Jørgensen, 30.
1-1: Milan Kuljic, 64.
2-1: Christian Høgni Jacobsen, 67.
3-1: Ólavur S. í Ólavsstovu, 73.
Dómari: Lars Müller
HB: Tróndur Vatnhamar - Mortan úr Hørg, Hans á Lag, Poul Thomas Dam, Tór Ingar Akselsen - Jákup á Borg, Kári Nielsen( Svenn F. Jacobsen, 66.), Rókur F. Jespersen (Ólavur í Ólavsstovu, 46.), Milan Kuljic - Christian Høgni Jacobsen, Rógvi Jacobsen (Pætur Jørgensen, 46.)
Gult kort: Hans á Lag, Milan Kuljic
VB/Sumba: Vlada Filopovic - Dimitri Jankovic, Suni úr Hørg, Birni Kærbech (Dánjal Johan Joensen, 55.), Jákup Olsen - Dan Djurhuus, Martin Tausen, Evrard Ble, Aco Pandurovic (Heini Bech, 90.) - Jón K. Poulsen, Birgir Jørgensen (Jón Samuelsen, 70.)
Gult kort: Suni úr Hørg, Dan Djurhuus, Dimitri Jankovic
Reytt kort: Suni úr Hørg (tvey gul)